# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Sum støðan er nú, so hava vit ikki ráð til nakað annað enn trý stig, um vit vilja spæla við í oddinum*

*Jákup á Borg, HB*

# Flaggskipið flýtur aftur

**Havnarbáturin er nú aftur mannaður. Hann er meldaður til róðurin á sundalagsstevnu, har hann skal takast við Eysturoyingin og Vestmenningin**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*




*Tað er fyrst og fremst ólavsøkuróðurin, sum er málið hjá manningini á Havnarbátinum*

Bert 39 manningar vóru til fyrsta róðurin á árinum í Klaksvík, og hetta er eitt tað minsta talið í fleiri ár. Harafturat vóru bert tveir bátar við hjá bæði 6-mannaførum við kvinnum og 10-mannaførum, og serliga lága luttakaratalið hjá 10-mannaførunum var skuffandi fyri nógvar av áskoðarunum.

Nú er tó líkt til, at ein bátar afturat ætlar sær við í kappingina hjá 10-mannaførunum, tí Havnarbáturin hevur boðað frá luttøku á sundalagsstevnuni.

## Mannaður við gomlum rógvarum

Magni Brøðraberg, nevndarlimur í Havnar Róðarfelag, sigur, at felagið hevur leitað í langa tíð fyri at finna eina manning til Havnarbátin. Og at enda gav hetta eisini úrslit.

Tað eru tó ikki óroyndir menn, sum hava sett seg handan árarnar á Havnarbátinum. Manningin hevur mest sum øll roynt hetta áður.

- Tað er eingin ivi um, at manningin á Havnarbátinum er góð. Tað eru góðir, gamlir rógvarar, sum hava mannað bátin, og teir hava allir róð nógv fyrr. Trupulleikin er tó, at teir hava slett ikki vant, meðan hinar báðar manningarnar helst hava vant í eitt hálvt ár, og tí verður ikki lætt hjá Havnarbátinum, sigur Magni.

Fyrstu ferð manningin var í bátinum og vandi, var í gjárkvøldið.

## Miðja eftir ólavsøkuni

Komandi fimm stevnurnar hava eisini 2000 metra mál fyri 10-mannaførini, og tá kann hugsast, at orkan hjá manningini á Havnarbátinum kanska ikki verður tann besta.

- Í øllum førum ikki teir fyrstu róðrarnar. Eg vænti tó, at sum vit nærkast ólavsøku, so fara úrslitini hjá Havnarbátinum at gerast betri og betri.

Tað er heldur eingin loyna, at Havnarbáturin miðar eftir ólavsøkuni.

- Ja, málið hjá Havnarbátinum er at fáa eitt gott úrslit á ólavsøku. Tá vera menn nógv betri fyri kropsliga, og málið er styttri enn 1000 metrar, so hetta verður stevnan, sum Havnarbáturin setir nøsina fram ímóti, sigur Magni.

Hann leggur at enda afturat, at tað hevði stóran týdning, at Havnarbáturin meldaði til sundalagsstevnuna, tí um báturin skal hava loyvi til at taka lut á ólavsøku, so skal hann hava luttikið í fýra stevnum undan ólavsøkuni.

# Vagnur venur á Argjum

**Argjamenn tykjast arbeiða við fullari ferð í royndunum at styrkja um spælarahópin. Frá mánadegnum ber til at knýta nýggjar spælarar at hópinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seinastu tíðina hava fleiri nýggir spælarar roynt seg á Argjum. Danski Martin Nielsen hevur vant við hópinum, og tað hava Allan Mørkøre og Høgni M. Joensen eisini gjørt. Tað er longu greitt, at Allan Mørkøre verður nýggjur maður í felagnum, tá flytingarvindeygað letur uppaftur, og tað verður Høgni mest sannlíkt eisini. Martin Nielsen er farin aftur til Danmarkar, men enn er ikki greitt, hvørt talan verður um sáttmála ella ikki.

Hartil var eisini Vagnur Mohr Mortensen partur av venjingini hjá felagnum hóskvøldið. Vagnur, sum altíð hevur spælt í HB, beit seg mest sum fastan í landsliðsverjuna í fjør heyst, tá hann spældi samfullar 90 minuttir í dystunum móti Litava og Fraklandi. Men í ár hevur hann millum lítið og einki gjørt við fótbóltin. Nú er so spurningurin, hvørt hann er maðurin, sum argjamenn vilja styrkja verjupartin av miðvøllinum við. Eyðun Dalsgarð, formaður í AB, vil enn einki siga, hvørt hetta verður veruleiki ella ikki. Men tað er lítil ivi um, at er Vagnur í venjing, so vil hann vera ein styrkur hjá einum og hvørjum liði í bestu føroysku deildini.



*Vagnur Mohr Mortensen hevur spælt einstakar dystir á næst besta HB-liðnum í ár, men annars hevur hann hildið frí fyri tað mesta*

## Føroyskir dómarar til Danmark

Í summar fáa tveir føroyskir dómarar møguleika at døma dystir í Danmark. Talan er um Ransin N. Djurhuus og Lars Müller. Ransin skal døma í Lyngby Cup, sum er stór millumtjóða fótbóltskapping. Hartil verður Lassin Isaksen eisini við á ferðini sum dómaramennari.

Lars skal døma í Vejle, har NM-kappingin fyri U17-lið er á skránni.

**-mørk**

## U17 skal venja sunnudagin

Føroyska U17-landsliðið í fótbólti er partur av NM-kappingini, sum verður hildin í Vejle. Fyrstu venjingarnar eru á skránni sunnudagin, og til hesar hava Pætur S. Clementsen og Finn Johannesen tikið út hesar 18 spælarar. Thomas J. Thomsen, Hallur Hansson, Kristin R. Mouritsen, Jógvan Rói Davidsen, Jógvan S. Nolsøe HB, Sørmund Kalsø, Helgi Samson, Dánjal Pauli Lervig, Poul Johan Poulsen, Kaj Leo í Bartalsstovu KÍ, Philip Jacobsen AB, Heini Vatnsdal, Hanus Mortensen, Mikal Jespersen, Heine Mortensen VB/TB, Jóan Símun Edmundsson B68, Terji Rasmussen. Róaldur Jacobsen B36, Viljormur Davidsen, Karl Løkin, Monrad H. Jacobnsen NSÍ, Bjarti Hansen FSV04, Bárður Hansen GÍ, Jens M. Jensen EB/S.

**-mørk**

## Rætting um venjarar

Í grein í mánadagsblaðnum skrivaðu vit, at higar til í ár vóru venjararnir hjá KÍ, AB og VB/Sumba sagdir úr starvi, umframt at B71-venjarin hevði takkað fyri seg. Ístaðin fyri VB/Sumba skuldi sjálvandi standa Skála. Vit biðja lesaran og VB/Sumba um at umbera okkum mistakið.

**-mørk**